Fíggjarmálaráðið

Dagfesting: 03.11.2023
Mál nr.: 23/20624
Málsviðgjørt: JEK

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	Løgtingslógaruppskotið
	§ 1 Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti (Ásetingarlógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 163 frá 10. desember 2020, verða gjørdar hesar broytingar:
§ 1. Vísandi til § 54 í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður landsskattur teirra, ið nevnd eru í § 1, nr. 1-6 og § 2, stk. 1, litra d, e og f, smb. tó § 8, stk. 2 og § 8 a, stk. 1 í somu løgtingslóg, ásettur soleiðis: 1) Er inntøka lægri enn kr. 65.000 verða 0% latin. 2) Er inntøkan kr. 65.000 ella hægri, men lægri enn kr. 235.000, verða kr. 0 latnar av kr. 65.000 og 15% av restini.	**1.** § 1, stk. 1 verður orðað soleiðis: "Vísandi til § 54 í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt verður skattur teirra, ið eru nevnd í § 1, stk. 1, nr. 1-6 og § 2, stk. 1, litra d-f, sbr tó § 8, stk. 2 og § 8 a, stk. 1 í somu løgtingslóg, ásettur soleiðis: 1) Er inntøkan lægri enn kr. 65.000 verða 0% latin. 2) Er inntøkan kr. 65.000 ella hægri, men lægri enn kr. 180.000, verða kr. 0 latnar

3) Er inntøkan kr. 235.000 ella hægri, men lægri enn kr. 330.000, verða kr. 25.500 latnar av kr. 235.000 og 20% av restini. 4) Er inntøkan kr. 330.000 ella hægri, men lægri enn kr. 800.000, verða kr. 44.500 latnar av kr. 330.000 og 25% av restini. 5) Er inntøkan kr. 800.000 ella hægri, verða kr. 162.000 latnar av kr. 800.000 og 30% av restini. *Stk. 2.* Vísandi til § 54 í samtíðarskattalógini verður skattur teirra, ið umrødd eru í § 25b, stk. 1, smb. § 33, nr. 13) í somu lóg ásettur til 35%. Í tann mun, tey í 1. pkt. nevndu hava skyldu til at rinda inngjald sbrt. løgtingslóg um eftirlønarsamansparing og skatt av eftirløn og rentutryggingum, verður skattur teirra ásettur eftir frádrátt fyri hetta inngjald. Skatturin verður býttur við 50% sum kommunuskattur og 50% sum landsskattur.	av kr. 65.000 og 14% av restini. 3) Er inntøkan kr. 180.000 ella hægri, men lægri enn kr. 280.000, verða kr. 16.100 latnar av kr. 180.000 og 15% av restini. 4) Er inntøkan kr. 280.000 ella hægri men lægri enn kr. 380.000, verða kr. 31.100 latnar av kr. 280.000 og 20% av restini. 5) Er inntøkan kr. 380.000 ella hægri, men lægri enn kr. 700.000, verða kr. 51.100 latnar av kr. 380.000 og 25% av restini. 6) Er inntøkan kr. 700.000 ella hægri, verða kr. 131.100 latnar av kr. 700.000 og 30% av restini.”
§ 1. Vísandi til § 54 í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður landsskattur teirra, ið nevnd eru í § 1, nr. 1-6 og § 2, stk. 1, litra d, e og f, smb. tó § 8, stk. 2 og § 8 a, stk. 1 í somu løgtingslóg, ásettur soleiðis: 1) Er inntøka lægri enn kr. 65.000 verða 0% latin. 2) Er inntøkan kr. 65.000 ella hægri, men lægri enn kr. 235.000, verða kr. 0 latnar av kr. 65.000 og 15% av restini. 3) Er inntøkan kr. 235.000 ella hægri, men lægri enn kr. 330.000, verða kr. 25.500	**2.** § 1, stk. 1 verður orðað soleiðis: “Vísandi til § 54 í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt verður skattur teirra, ið eru nevnd í § 1, stk. 1, nr. 1-6 og § 2, stk. 1, litra d-f, sbr tó § 8, stk. 2 og § 8 a, stk. 1 í somu løgtingslóg, ásettur soleiðis: 1) Er inntøkan lægri enn kr. 65.000 verða 0% latin. 2) Er inntøkan kr. 65.000 ella hægri, men lægri enn kr. 180.000, verða kr. 0 latnar av kr. 65.000 og 13% av restini. 3) Er inntøkan kr. 180.000 ella hægri, men lægri enn

latnar av kr. 235.000 og 20% av restini. 4) Er inntøkan kr. 330.000 ella hægri, men lægri enn kr. 800.000, verða kr. 44.500 latnar av kr. 330.000 og 25% av restini. 5) Er inntøkan kr. 800.000 ella hægri, verða kr. 162.000 latnar av kr. 800.000 og 30% av restini. *Stk. 2.* [19] [20] Vísandi til § 54 í samtíðarskattalógini verður skattur teirra, ið umrødd eru í § 25b, stk. 1, smb. § 33, nr. 13) í somu lóg ásettur til 35%. Í tann mun, tey í 1. pkt. nevndu hava skyldu til at rinda inngjald sbrt. løgtingslóg um eftirlønarsamansparing og skatt av eftirløn og rentutryggingum, verður skattur teirra ásettur eftir frádrátt fyri hetta inngjald. Skatturin verður býttur við 50% sum kommunuskattur og 50% sum landsskattur.	kr. 330.000, verða kr. 14.950 latnar av kr. 180.000 og 15% av restini. 4) Er inntøkan kr. 330.000 ella hægri men lægri enn kr. 450.0000, verða kr. 37.450 latnar av kr. kr. 330.000 og 20% av restini. 5) Er inntøkan kr. 450.000 ella hægri, men lægri enn kr. 600.000, verða kr. 61.450 latnar av kr. 450.000 og 25% av restini. 6) Er inntøkan kr. 600.000 ella hægri, verða kr. 98.950 latnar av kr. 600.000 og 30% av restini.”